# Frágreiðing til aðalfundin hjá Svimjisambandi Føroya




Fyri tíðarskeiðið 13. apríl 2024 til 20. mars 2025

# Felagsskapurin

## Starvsnevnd

Hetta árið var starvsnevnd SSF: Rókur í Jákupsstovu, forfólk, Johan Martin Thorsteinsson, næstforfólk, Gunnvá Thomsen, skrivari, Sabina Poulsen og Annika Olsen, nevndarlimir, umframt Signhild Rannváardóttir sum forfólk í íðkaranevnd SSF og Hálvdan Rúni Gaardbo, tiltakslimur. Starvsnevndarfundir hava verið umleið eina ferð um mánaðin.

Johan Martin Thorsteinsson og Gunnvá Thomsen hava í sambandi við hendan aðalfund fráboðað, at tey ynskja ikki at taka við afturvali, og vilja vit takka teimum fyri teirra tíð í starvsnevnd SSF. Vónandi verða tey ikki ov langt burturi, um og tá ið tørvur verður á hjálp.

## Svimjinevnd

Hetta árið hevur svimjinevndin verið: Bjørg O. Jensen, forfólk, Jón Bjarnason, næstforfólk og Rakul A. Dam, skrivari/nevndarlimur. Seinnu helvt hevur Bjørg O. Jensen verið í barsilsfarloyvi. Svimjinevndin tekur sær av heimligu kappingunum, umframt spurningum ísv kappingarreglur SSF.

## Dómsnevnd

Hetta árið var dómsnevnd SSF: Anni á Hædd, forfólk og Jórun Eið Johannesen og Monika H. Rasmussen, nevndarlimir. Einki mál hevur verið hjá dómsnevndini at viðgera, men bíða vit enn eftir afturmelding frá Ítróttardómstóli ÍSF, um spurningar til mál frá áðrenn hetta.

## Dómarar

Útbúnu yvirdómarar SSF eru: Dann Hjelm, Elin Matras, Katja Lervig, Thurid Kjærbo, Annika N. Johannesen, Hálvdan Rúni Gaardbo og Rakul N. í Lágabø. Nú í 2025 er Rakul í Lágabø komin afturat sum altjóða yvirdómari, umframt John D. Olsen sum altjóða startari. Sostatt eru okkara altjóða yvirdómarar nú Dann Hjelm, Katja Lervig, Hálvdan Rúni Gaardbo og Rakul N. í Lágabø, og okkara altjóða startarar Erling Eidesgaard, Eyðun Húsgarð og John D. Olsen.

Altjóða yvirdómararnir og startararnir fingu endurnýggjað sína góðkenning á vetri 2022, so at tey eru góðkend av altjóða svimjisambandinum World Aquatics, fram til árslok 2026. Eingin yvirdómari umboðaði okkum altjóða í 2024, men Rúni Gaardbo luttók á dómaraskeiði í Warszawa í februar 2025, umframt Katja Lervig tá við fjarsambandi. Altjóða dómarar hava vaksandi týdning fyri okkum, nú World Aquatics krevur slíkar til stevnur har tíðir skulu kunna brúkast til HM og OL.

## Svimjiskúlin

Hálvdan Rúni Gaardbo, Pálin Olsen og Jórun Eið Johannesen eru oddafólk í Svimjiskúla Føroya, umframt at vit hava onnur afturat útbúgvin til at kunna undirvísa í skipanini. Hetta árið hevur lítið virksemi verið í sjálvum skúlanum, út yvir at Rúni hevur havt skeið fyri Ægir og Hellufoss, umframt at forfólk og aðalskrivari SSF hava verið á fundum við fólk í skúlaskipanini, um møguligt samstarv.

## Lívbjarging

Svimjisambandið endurnýggjaði á heysti 2022 lívbjargingarskipan okkara, tá ið 10 fólk tóku prógv sum lívbjargingardómarar í skipanini hjá SvømDanmark. Hesi 10 skulu m.a. hvørt ár hava minst 5 lívbjargarar upp til roynd, og megnaðu øll hetta í 2023. Sólgerð M. Joensen samskipar átakið. Farna árið hevur í so lítið virksemi verið, m.a. tí vit bíðaðu meðan danir fingu nýggja KT-skipan í lag.

## Landsliðsvenjari, -toymi og samskipari

Eftir at hava roynt okkum við landsliðsvenjara síðani juni 2021, ið síðani í 2023 varð víðkað til eitt landsliðstoymi, fór starvsnevndin í 2024 undir eitt umfar til at endurskoða skipanina, m.a. við fundi við feløgini í oktober 2024. Hetta arbeiðið er ikki komið heilt á mál, men varð ein avleiðing at verandi loysn við landsliðstoyminum helt uppat um ársskiftið 2024/2025.

Í staðin er Hálvdan Rúni Gaardbo settur sum landsliðssamskipari, við ábyrgd fyri úrvalsvirkseminum, umframt landsliðnum í samráð við venjarar og íðkaraumboði.

Vit í SSF vilja gjarna takka nú fráfarna toymi fyri teirra innsats, sum rættiliga støðugt gav góð úrslit á altjóða stevnum, máld sum heiðursmerki, met og persónligar bestu tíðir. Tey trý í toyminum vóru Kristian Martin Joensen, Rúna Jakobsen og Hálvdan Rúni Gaardbo.

## Stevnutøkningur og stroymitoymi

Hóast Ólavur Hansen fór úr starvsnevnd SSF í 2022, so hevur hann tíbetur hildið áfram sum álítandi tøkningur hjá okkum, tá ið tað kemur til tær skipanir og ta tøkniligu útgerð, sum vit brúka til svimjistevnur, umframt samskiftið við tey KT-fólk sum bjóða seg fram til sjálvar stevnurnar. Afturat hesum hava vit góða nyttu av sokallaða 'stroymitoyminum', sum seinastu árini hava verið serliga Jákup og Bjarki í Jákupsstovu, ið taka sær av stroyming frá stevnum SSF. Vit kunnu gott brúka fleiri fólk til stroymitoymið, til at tryggja nøktandi manning til hetta ymiska.

## Skrivstova, bókhald og aðalskrivari

Hetta árið hevur forfólkið tikið sær av skrivstovuni, við hjálp frá serliga næstforfólkinum Johan Martin Thorsteinsson, umframt síðani september 2024 frá aðalskrivaranum Sølvi Reinert Hansen. Uppgávurnar eru serliga at fyriskipa okkara meistarastevnur, landsliðsluttøka og tiltøk, umframt í alsamt størri mun at gera umsóknir til stuðulsskipanir, og uppgerðir í teimum førum har játtan fekst. Tvær stórar uppgávur í 2024 vóru svimjifrálæruráðstevnan Nordic Learn to Swim Conference í Havn, umframt umsókn til nýggju úrvalsskipanina, við tilhoyrandi virksemis-, landsliðs- og úrvalsætlan.

## Íðkaranevnd

Hetta árið hevur íðkaranevnd SSF verið Barbara Debes, Natanael Matras, Rói Bech og Signhild Rannváardóttir. Signhild er forfólk, Natanael næstforfólk, Barbara skrivari og Rói nevndarlimur.

Eitt stórt hjá íðkaranevndini í 2024, var at tey fingu endurstovnað árligu gallaveitslu SSF, sum varð hildin eina viku aftaná FM á stuttgeil 2024, og sum yvirhøvur varð ein stór succés.

Í hesum samanhangi skipaði íðkaranevndin fyri innleiðandi framløgu, ætlað serliga til íðkararnar fáa heilsað uppá íðkaranevndina, umframt at hoyra um hví at vit hava eina íðkaranevnd.

## Felagsskapurin

Afturat okkum sjálvum í nevndum SSF og feløgum, eru nógvar góðar kreftir í svimjingini sum vit dúva uppá, serliga í sambandi við meistarastevnur og landsliðsvirksemi. Hetta er dýrabærur stuðul, ið vit lukkutíð fáa fyri lítið og lætt.

Serliga er árligi kalendarafundurin ein góð kelda til hjálp og konsensus í sambandi við heimligu stevnurnar, umframt nú rímiliga regluligu forfólkafundirnir, ið vit byrjaðu við í 2022.

Árliga svimjiráðstevnan er ikki komin aftur omaná korona, men hava vit í staðin regluligar forfólkafundir, farna árið í september 2024 og januar 2025. Evnini hava serliga verið um ætlanir og framtíðarútlit SSF, men eisini til at fáa afturmeldingar til endurskoðan av strategi ÍSF.

## Limir í føroyskum svimjifeløgum

Nú í mars 2025 vóru tað1376 limir í føroysku svimjifeløgunum, harav 400 í Havnar Svimjifelag (HS), 400 í Ægir, 178 í Svimjifelagnum FLOT, 150 í Suðuroyar Svimjifelag (SuSvim), 109 í Svimjifelagnum Reysta, 53 í Fuglafjarðar Svimjifelag (FS) og 86 í Svimjifelagnum Hellufossur.

Til samanbering vóru tað í 2024 tilsamans 1258 limir í føroysku svimjifeløgunum, harav 400 í Havnar Svimjifelag (HS), 400 í Ægir, 162 í Svimjifelagnum FLOT, 152 í Suðuroyar Svimjifelag (SuSvim), 72 í Svimjifelagnum Reysta, 42 í Fuglafjarðar Svimjifelag (FS) og 30 í Svimjifelagnum Hellufossur.



# Svimjiárið 2023-2024

## AQUA stevnur í føroyskum svimjihallum

Føroysk svimjifeløg og SSF skipaðu hetta svimjiárið fyri 12 AQUA-góðkendum svimjistevnum í svimjihallum, harav 4 meistarastevnum, har málbólkurin vóru føroysk børn, ung og vaksin.

| Stevna | Staður | Dagfesting | Hylur | Kapp. | Feløg | Íðkarar | Lið | Úrslit | AQUA |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| HS Open | Tórshavn | 30.sep-1.okt.23 | 25m | 42 | 6 | 81 | 20 | 529 | 645 |
| Ægir Open | Klaksvík | 21.-22.okt.23 | 25m | 36 | 5 | 108 | 0 | 588 | 696 |
| FMS/JMS | Tórshavn | 10.-12.nov.23 | 25m | 86 | 4 | 64 | 53 | 580 | 105 |
| ABMS Sprint | Klaksvík | 18.nov.23 | 25m | 28 | 6 | 186 | 28 | 729 | 518 |
| HS Jólasprint | Tórshavn | 16.des.23 | 25m | 31 | 4 | 74 | 17 | 317 | 575 |
| SuSvim Open | Vágur | 13.-14.jan.24 | 50m | 38 | 4 | 65 | 10 | 408 | 631 |
| Ægir Open | Klaksvík | 17.-18.feb.24 | 25m | 51 | 6 | 83 | 21 | 560 | 706 |
| SuSvim Open | Vágur | 16.-17.mar.24 | 50m | 38 | 4 | 60 | 13 | 393 | 680 |
| ABMS 24 | Klaksvík | 20.-21.apr.24 | 25m | 69 | 7 | 134 | 31 | 1107 | 519 |
| HS Flaggdags | Tórshavn | 25.apr.24 | 25m | 31 | 3 | 51 | 16 | 241 | 619 |
| FML/JML | Vágur | 10.-12.mai.24 | 50m | 80 | 4 | 50 | 30 | 534 | 723 |
| Tórshavn Open | Tórshavn | 28.-29.jun.24 | 25m | 61 | 4 | 68 | 16 | 493 | 739 |

## Aðrar stevnur í føroyskum svimjihallum

Føroysk svimjifeløg skipaðu hetta svimjiárið fyri 6 stuttleikastevnum, fyri okkara yngstu aldursbólkar: SuSvim-stevna í Páls Høll 28. okt. 23 (har tey svumu breiddir), FS-stevna í Fuglafirði 2. des. 23, FLOT-stevna á Toftum 3. feb. 24, HS-stevna á Argjum 24. feb. 24, SuSvim-stevna í Páls Høll 9. mar. 22 (har tey svumu breiddir), og Reysta-stevna í Leirvík 6. apr. 24.

Ein stevna mátti avlýstast vegna tekniskar trupulleikar: HS-stevna á Argjum 23. sep. 23

# Uttanlanda og altjóða stevnur

Landslið SSF luttóku á 7 uttanlanda og altjóða stevnum, hetta svimjiárið, umframt at feløg luttóku í øllum førum á Køge Open 2023 og Reykjavík International 2024, og at Elisabeth Erlendsdóttir og Vár E. Eidesgaard búgva og kappast í USA, og Jonna og Líggjas Joensen í Danmark.

| Stevna | Land | Dagfesting | Hylur | Íðkarar | Lið | Úrslit | Gull | Silvur | Bronsa | AQUA |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| World Cup 23 | GER | 6.-8.okt.23 | 50m | 4 | 0 | 12 | 0 | 0 | 0 | 703 |
| NM/NJM 23 | EST | 1.-3.des.23 | 25m | 14 | 6 | 73 | 0 | 0 | 2 | 734 |
| HM 24 | QAT | 11.-18.feb.24 | 50m | 1 | 0 | 2 | 0 | 0 | 0 | 692 |
| DO 24 | DEN | 11.-14.apr.24 | 50m | 15 | 0 | 66 | 0 | 0 | 0 | 767 |
| EM 24 | SRB | 17.-23.jun.24 | 50m | 2 | 0 | 7 | 0 | 0 | 0 | 718 |
| NMU 24 | FIN | 2.-3.jul.24 | 50m | 11 | 6 | 43 | 2 | 1 | 1 | 732 |
| EJM 24 | LTU | 2.-7.jul.24 | 50m | 2 | 0 | 10 | 0 | 0 | 0 | 720 |

# Landsliðshópar 2023-2024

## World Cup 2023 í Berlin, Týsklandi

**Svimjarar (4)**: Lea O. Højsted (2008), Róa Trygvadóttir (2008) og Líggjas Joensen (2008) úr Ægir, og Bartal E. Eidesgaard (2003) úr HS

**Venjari**: Rúni Gaardbo

**Ferðaleiðari**: Rúna Jakobsen

## NM/NJM 2023 í Tartu, Estlandi

**Svimjarar (13)**: Lea Osberg Højsted (2008), Lea Petersen (2009), Róa Trygvadóttir (2008), Heini M. Askham (2006) og Líggjas Joensen (2008) úr Ægir, Bartal E. Eidesgaard (2003), Isak Brisenfeldt (2006), Oddvaldur Leivsson (2008) og Silas D. Lindberg (2008) úr HS, Jóhanna Ólavsdóttir (2007), Bárður Ólavsson (2008) og Fróði Hansen (2008) úr FS, og Bjarta í Lágabø (2009) úr SuSvim

**Venjari**: Kristian Martin Joensen og Rúni Gaardbo

**Ferðaleiðari**: Rúna Jakobsen

Eitt serligt í sambandi við hesa luttøku, var nýtt samstarv við Parasport Føroyar, har tey luttóku saman við okkum. Teirra vóru svimjarin Andrias Mellemgaard (2009) og venjari Bjørg Ólavsdóttir.

### HM 2024 í Doha, Katar

**Svimjari (1)**: Líggjas Joensen (2008) úr Ægir

**Venjari**: Rúni Gaardbo

**Ferðaleiðari**: Sabina Poulsen

# Føroysk met og juniormet

Føroyskir svimjarar settu 15 føroysk met og 23 føroysk juniormet, hetta svimjiárið 2023-2024, tað vil siga frá 1. september 2023 til 31. august 2024.

Til samanberingar settu føroyskir svimjarar tilsamans 11 føroysk met og 11 føroysk juniormet, undanfarna svimjiárið 2022-2023.

## Føroysk met

| Teinur | Grein | Hylur | Kyn | Tíð | Svimjari | Aldur | Felag | Stevna | Dagur | Land |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 100 | Bringa | 25m | M | 01:02.19 | Bartal E. Eidesgaard | 2003 | HS | NM | 2023-12-01 | NOR |
| 200 | Firvald | 50m | F | 02:27.30 | Jóhanna Ólavsdóttir | 2007 | FS | DO | 2024-04-12 | DEN |
| 50 | Rygg | 50m | F | 00:29.47 | Elisabeth Erlendsdóttir | 2005 | HS | DO | 2024-04-13 | DEN |
| 200 | Bringu | 50m | F | 02:41.82 | Lea Osberg Højsted | 2008 | Ægir | DO | 2024-04-13 | DEN |
| 4x100 | Frí | 50m | X | 03:53.85 | Lea Osberg Højsted<br>Heini Mohr Askham<br>Róa Trygvadóttir<br>Líggjas Joensen | 2006 | Ægir | FM | 2024-05-10 | FRO |
| 4x100 | Frí | 50m | M | 03:36.87 | Oddvaldur Leivsson<br>Bartal E. Eidesgaard<br>Silas Dam Lindberg<br>Isak D. Brisenfeldt | 2003 | HS | FM | 2024-05-12 | FRO |
| 50 | Bringu | 50m | M | 00:29.27 | Bartal E. Eidesgaard | 2003 | HS | EM | 2025-06-21 | SRB |
| 4x100 | Blandað | 25m | M | 03:55.14 | Oddvaldur Leivsson<br>Bartal E. EIdesgaard<br>Áki Eliassen<br>Isak D. Brisenfeldt | 2003 | HS | TO | 2024-06-28 | FRO |
| 4x200 | Frí | 25m | M | 07:40.27 | Isak D. Brisenfeldt<br>Oddvaldur Leivsson<br>Silas Dam Lindberg<br>Bartal E. Eidesgaard | 2003 | HS | TO | 2024-07-28 | FRO |

| | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 4x100 | Blandað | 50m | F | 04:37.30 | Bjarta í Lágabø<br>Lea Osberg Højsted<br>Róa Trygvadóttir<br>Jórun Winther | 2008 | SSF | NMU | 2024-07-02 | FIN |
| 200 | Firvald | 50m | M | 02:05.22 | Isak D. Brisenfeldt | 2006 | HS | EJM | 2024-07-02 | LTU |
| 4x100 | Blandað | 50m | M | 04:07.99 | Óli Mikkelsen<br>Fróði Hansen<br>Bárður Ólavsson<br>Líggjas Joensen | 2008 | SSF | NMU | 2024-07-02 | FIN |
| 4x100 | Frí | 50m | M | 03:40.52 | Fróði Hansen<br>Oddvaldur Leivsson<br>Silas Dam Lindberg<br>Líggjas Joensen | 2008 | SSF | NMU | 2024-07-02 | FIN |
| 100 | Bringu | 50m | F | 01:14.06 | Lea Osberg Højsted | 2008 | Ægir | NMU | 2024-07-03 | FIN |
| 4x200 | Frí | 50m | M | 07:56.77 | Líggjas Joensen<br>Oddvaldur Leivsson<br>Fróði Hansen<br>Silas Dam Lindberg | 2008 | SSF | NMU | 2024-07-03 | FIN |

## Føroysk juniormet

| Teinur | Grein | Hylur | Kyn | Tíð | Svimjari | Aldur | Felag | Stevna | Dagur | Land |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 4x50 | Frí | 25m | X | 01:43.58 | Jonna Joensen<br>Líggjas Joensen<br>Heini M. Askham<br>Róa Trygvadóttir | 2005 | Ægir | FM | 2023-11-10 | FRO |
| 4x100 | Frí | 25m | M | 03:39.03 | Áki Eliassen<br>Oddvaldur Leivsson<br>Silas D. Lindberg<br>Isak Brisenfeldt | 2006 | HS | FM | 2023-11-10 | FRO |
| 4x200 | Frí | 25m | M | 07:38.99 | Isak Brisenfeldt<br>Líggjas Joensen<br>Heini M. Askham<br>Fróði Hansen | 2006 | SSF | NM | 2023-12-01 | EST |
| 200 | Firvald | 25m | M | 02:03.62 | Isak Brisenfeldt | 2006 | HS | NM | 2023-12-02 | EST |
| 4x100 | Blandað | 25m | M | 04:00.82 | Oddvaldur Leivsson<br>Heini M. Askham<br>Isak Brisenfeldt<br>Líggjas Joensen | 2006 | SSF | NM | 2023-12-02 | EST |
| 4x100 | Frí | 25m | M | 03:35.18 | Isak Brisenfeldt<br>Líggjas Joensen<br>Heini M. Askham<br>Oddvaldur Leivsson | 2006 | SSF | NM | 2023-12-03 | EST |
| 200 | Firvald | 50m | M | 02:09.50 | Isak Brisenfeldt | 2006 | HS | RIG | 2024-01-27 | ISL |

| | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 200 | Firvald | 50m | F | 02:27.69 | Jóhanna Ólavsdóttir | 2007 | FS | RIG | 2024-01-28 | ISL |
| 200 | Firvald | 50m | F | 02:37.30 | Jóhanna Ólavsdóttir | 2007 | FS | DO | 2024-04-12 | DEN |
| 200 | Frí | 50m | M | 01:53.83 | Líggjas Joensen | 2008 | Ægir | DO | 2024-04-12 | DEN |
| 200 | Frí | 50m | M | 01:53.20 | Líggjas Joensen | 2008 | Ægir | DO | 2024-04-12 | DEN |
| 200 | Firvald | 50m | M | 02:07.42 | Isak Brisenfeldt | 2006 | HS | DO | 2024-04-13 | DEN |
| 200 | Firvald | 50m | M | 02:07.41 | Isak Brisenfeldt | 2006 | HS | DO | 2024-04-13 | DEN |
| 200 | Bringu | 50m | F | 02:41.82 | Lea Osberg Højsted | 2008 | Ægir | DO | 2024-04-13 | DEN |
| 4x100 | Frí | 50m | X | 03:53.85 | Lea Osberg Højsted<br>Heini Mohr Askham<br>Róa Trygvadóttir<br>Líggjas Joensen | 2006 | Ægir | FM | 2024-05-10 | FRO |
| 4x200 | Frí | 50m | M | 08:12.20 | Isak D. Brisenfeldt<br>Áki Eliassen<br>Oddvaldur Leivsson<br>Silas Dam Lindberg | 2006 | HS | FM | 2024-05-11 | FRO |
| 200 | Frí | 50m | M | 01:53.14 | Líggjas Joensen | 2008 | Ægir | | 2024-07-02 | FIN |
| 4x100 | Blandað | 50m | F | 04:37.30 | Bjarta í Lágabø<br>Lea Osberg Højsted<br>Róa Trygvadóttir<br>Jórun Winther | 2008 | SSF | NMU | 2024-07-02 | FIN |
| 200 | Firvald | 50m | M | 02:05.22 | Isak D. Brisenfeldt | 2006 | HS | EJM | 2024-07-02 | LTU |
| 4x100 | Blandað | 50m | M | 04:07.99 | Óli Mikkelsen<br>Fróði Hansen<br>Bárður Ólavsson<br>Líggjas Joensen | 2008 | SSF | NMU | 2024-07-02 | FIN |
| 4x100 | Frí | 50m | M | 03:40.52 | Fróði Hansen<br>Oddvaldur Leivsson<br>Silas Dam Lindberg<br>Líggjas Joensen | 2008 | SSF | NMU | 2024-07-02 | FIN |
| 100 | Bringu | 50m | F | 01:14.06 | Lea Osberg Højsted | 2008 | Ægir | NMU | 2024-07-03 | FIN |
| 4x200 | Frí | 50m | M | 07:56.77 | Líggjas Joensen<br>Oddvaldur Leivsson<br>Fróði Hansen<br>Silas Dam Lindberg | 2008 | SSF | NMU | 2024-07-03 | FIN |

# Svimjiárið 2024-2025

## AQUA stevnur í føroyskum svimjihallum

Føroysk svimjifeløg og SSF hava til nú, hetta svimjiárið, skipað fyri tilsamans 7 AQUA-góðkendum svimjistevnum í svimjihallum, harav 1 meistarastevnu, har málbólkurin vóru føroysk børn, ung og vaksin.

| Stevna | Staður | Dagfesting | Hylur | Kapp. | Feløg | Íðkarar | Lið | Úrslit | AQUA |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| HS Open | Tórshavn | 28.-29.sep.24 | 25m | 38 | 5 | 86 | 13 | 491 | 655 |
| Ægir Open | Klaksvík | 26.-27.okt.24 | 25m | 39 | 5 | 119 | 45 | 765 | 662 |
| FMS/JMS | Tórshavn | 8.-10.nov.24 | 25m | 86 | 4 | 61 | 46 | 609 | 798 |
| SMS Jólasprint | Tórshavn | 14.dec.24 | 25m | 31 | 6 | 85 | 18 | 351 | 649 |
| SuSvim Open | Vágur | 11.-12.jan.25 | 50m | 38 | 4 | 65 | 10 | 380 | 593 |
| HS Open | Tórshavn | 8.-9.feb.25 | 50m | 39 | 7 | 102 | 36 | 578 | 636 |
| SuSvim Open | Vágur | 22.-23.feb.25 | 50m | 38 | 4 | 75 | 16 | 457 | 664 |

## Aðrar stevnur í føroyskum svimjihallum

Føroysk svimjifeløg hava hartil til nú skipað fyri 6 stuttleikastevnum, hetta svimjiárið, fyri okkara yngstu aldursbólkar: HS-stevna á Argjum 21. sep. 24, SuSvim-stevna í Páls Høll 12. okt. 24 (har tey svumu breiddir), FS-stevna 7. des. 24, SHF-stevna í Kvívík 18. jan. 25, FLOT-stevna 1. feb. 25, SuSvim-stevna í Páls Høll 8. mar. 25 (har tey svumu breiddir).

Ein stevna mátti avlýsast vegna kostnaða: FS/Reysta/FLOT-stevna 12. okt. 24

# Uttanlanda og altjóða stevnur

Landslið SSF hava til nú luttikið á 2 uttanlanda og altjóða svimjistevnum, hetta svimjiárið, umframt at feløg hava luttikið í øllum førum á Køge Open 2024 og Reykjavík International 2025, og at Elisabeth Erlendsdóttir og Vár E. Eidesgaard búgva og kappast í USA, og Jonna og Líggjas Joensen í Danmark.

| Stevna | Land | Dagfesting | Hylur | Íðkarar | Lið | Úrslit | Gull | Silvur | Bronsa | AQUA |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| NM/NJM24 | DEN | 1.-3.des.24 | 25m | 14 | 5 | 68 | 2 | 2 | 2 | 779 |
| HMS 24 | HUN | 10.-15.des.24 | 25m | 3 | 0 | 5 | 0 | 0 | 0 | 769 |

# Landsliðshópar 2024-2025

## NM/NJM 2024 í Helsinki, Finnlandi

**Svimjarar (14)**: Lea Osberg Højsted (2008), Róa Trygvadóttir (2008), Heini M. Askham (2006) og Líggjas Joensen (2008) úr Ægir, Bartal E. Eidesgaard (2003), Isak Brisenfeldt (2006), Áki Eliassen (2006), Silas D. Lindberg (2008) og Ari R. Weihe (2006) úr HS, Jóhanna Ólavsdóttir (2007) og Fróði Hansen (2008) úr FS, og Bjarta í Lágabø (2009), Jón Hofgaard (1992) og Alisa Vestergård (2003) úr SuSvim

**Venjari**: Kristian Martin Joensen og Rúna Jakobsen

**Ferðaleiðari**: Gunnvá Thomsen

## HMS 2024 í Budapest, Ungarn

**Svimjarar (3)**: Lea Osberg Højsted (2008) og Líggjas Joensen (2008) úr Ægir, og Elisabeth Erlendsdóttir (2005) úr HS

**Venjari**: Rúni Gaardbo

**Ferðaleiðari**: Bjørg Ólavsdóttir

Isak Brisenfeldt (2006) úr HS var eisini úttikin og við á ferðini, men varð sjúkur og luttók tí ikki.

# Føroysk met og juniormet

Føroyskir svimjarar hava til nú sett 23 føroysk met og 16 føroysk juniormet hetta svimjiárið 2024-2025, tað vil siga frá 1. september 2024 til 31. august 2025. Til samanberingar settu føroyskir svimjarar tilsamans 15 føroysk met og 23 føroysk juniormet, undanfarna svimjiárið 2023-2024.

## Føroysk met

| Teinur | Grein | Hylur | Kyn | Tíð | Svimjari | Aldur | Felag | Stevna | Dagur | Land |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 200 | Bringa | 25m | F | 02:34.89 | Lea O. Højsted | 2008 | Ægir | ÆO | 2024-10-26 | FRO |
| 100 | Frí | 25m | M | 00:50.04 | Bartal E. Eidesgaard | 2003 | HS | FM | 2024-11-08 | FRO |
| 50 | Bringa | 25m | F | 00:32.64 | Lea O. Højsted | 2008 | Ægir | FM | 2024-11-08 | FRO |
| 4x50 | Frí | 25m | X | 01:42.22 | Lea O. Højsted<br>Jonna Joensen<br>Heini M. Askham<br>Líggjas Joensen | 2005 | Ægir | FM | 2024-11-08 | FRO |
| 100 | Bringa | 25m | F | 01:10.57 | Lea O. Højsted | 2008 | Ægir | FM | 2024-11-09 | FRO |
| 100 | Firvald | 25m | M | 00:53.67 | Isak Brisenfeldt | 2006 | HS | FM | 2024-11-09 | FRO |
| 100 | Bringa | 25m | M | 01:02.08 | Bartal E. Eidesgaard | 2003 | HS | FM | 2024-11-09 | FRO |
| 50 | Frí | 25m | M | 00:22.83 | Bartal E. Eidesgaard | 2003 | HS | FM | 2024-11-09 | FRO |
| 4x50 | Frí | 25m | M | 01:34.25 | Bartal E. Eidesgaard<br>Jóni J. Strøm<br>Áki Eliassen<br>Isak Brisenfeldt | 2003 | HS | FM | 2024-11-09 | FRO |
| 4x100 | Blandað | 25m | M | 03:54.60 | Silas D. Lindberg<br>Bartal E. Eidesgaard<br>Áki Eliassen<br>Isak Brisenfeldt | 2003 | HS | FM | 2024-11-10 | FRO |
| 200 | Bringa | 25m | F | 02:33.17 | Lea O. Højsted | 2008 | Ægir | FM | 2024-11-10 | FRO |
| 4x100 | Frí | 25m | X | 03:45.23 | Jonna Joensen<br>Heini M. Askham<br>Lea Petersen<br>Líggjas Joensen | 2005 | Ægir | FM | 2024-11-10 | FRO |
| 200 | Firvald | 25m | M | 02:00.21 | Isak Brisenfeldt | 2006 | HS | FM | 2024-11-10 | FRO |
| 4x200 | Frí | 25m | M | 07:22.67 | Bartal E. Eidesgaard<br>Heini M. Askham<br>Isak Brisenfeldt<br>Líggjas Joensen | 2003 | SSF | NM | 2024-12-01 | FRO |
| 200 | Bringa | 25m | F | 02:31.59 | Lea O. Højsted | 2008 | Ægir | NM | 2024-12-01 | FRO |
| 100 | Bringa | 25m | F | 01:10.07 | Lea O. Højsted | 2008 | Ægir | NM | 2024-12-02 | FRO |

| | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 200 | Firvald | 25m | M | 01:59.39 | Isak Brisenfeldt | 2006 | HS | NM | 2024-12-02 | FRO |
| 4x100 | Frí | 25m | M | 03:21.75 | Bartal E. Eidesgaard<br>Heini M. Askham<br>Isak Brisenfeldt<br>Líggjas Joensen | 2003 | SSF | NM | 2024-12-03 | FRO |
| 100 | Frí | 25m | M | 00:49.95 | Bartal E. Eidesgaard | 2003 | HS | NM | 2024-12-03 | FRO |
| 200 | Firvald | 50m | F | 02:25.71 | Jóhanna Ólavsdóttir | 2007 | FS | RIG | 2025-01-26 | FRO |
| 50 | Bringa | 50m | F | 00:33.88 | Lea O. Højsted | 2008 | Ægir | SO | 2025-02-22 | FRO |
| 200 | Bringa | 50m | F | 02:39.27 | Lea O. Højsted | 2008 | Ægir | SO | 2025-02-23 | FRO |
| 100 | Bringa | 25m | F | 01:09.27 | Lea O. Højsted | 2008 | Ægir | LO | 2025-03-16 | FRO |

## Føroysk juniormet

| Teinur | Grein | Hylur | Kyn | Tíð | Svimjari | Aldur | Felag | Stevna | Dagur | Land |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 200 | Firvald | 25m | M | 02:02.66 | Isak Brisenfeldt | 2006 | HS | KO | 2024-10-13 | POL |
| 200 | Bringa | 25m | F | 02:34.89 | Lea O. Højsted | 2008 | Ægir | ÆO | 2024-10-26 | FRO |
| 100 | Frí | 25m | M | 00:50.43 | Isak Brisenfeldt | 2006 | HS | FM | 2024-11-08 | FRO |
| 50 | Bringa | 25m | F | 00:32.64 | Lea O. Højsted | 2008 | Ægir | FM | 2024-11-08 | FRO |
| 100 | Firvald | 25m | M | 00:53.67 | Isak Brisenfeldt | 2006 | HS | FM | 2024-11-09 | FRO |
| 100 | Bringa | 25m | F | 01:10.57 | Lea O. Højsted | 2008 | Ægir | FM | 2024-11-09 | FRO |
| 200 | Firvald | 25m | M | 02:00.21 | Isak Brisenfeldt | 2006 | HS | FM | 2024-11-10 | FRO |
| 200 | Bringa | 25m | F | 02:33.17 | Lea O. Højsted | 2008 | Ægir | FM | 2024-11-10 | FRO |
| 200 | Bringa | 25m | F | 02:31.59 | Lea O. Højsted | 2008 | Ægir | NM | 2024-12-01 | FRO |
| 100 | Bringa | 25m | F | 01:10.07 | Lea O. Højsted | 2008 | Ægir | NM | 2024-12-02 | FRO |
| 200 | Firvald | 25m | M | 01:59.39 | Isak Brisenfeldt | 2006 | HS | NM | 2024-12-02 | FRO |
| 4x50 | Blandað | 25m | M | 01:49.52 | Óli Mikkelsen<br>Silas D. Lindberg<br>Áki Eliassen<br>Jóni J. Strøm | 2006 | HS | HJ | 2024-12-14 | FRO |
| 200 | Firvald | 50m | F | 02:25.71 | Jóhanna Ólavsdóttir | 2007 | FS | RIG | 2025-01-26 | FRO |
| 50 | Bringa | 50m | F | 00:33.88 | Lea O. Højsted | 2008 | Ægir | SO | 2025-02-22 | FRO |
| 200 | Bringa | 50m | F | 02:39.27 | Lea O. Højsted | 2008 | Ægir | SO | 2025-02-23 | FRO |
| 100 | Bringa | 25m | F | 01:09.27 | Lea O. Højsted | 2008 | Ægir | LO | 2025-03-16 | FRO |

# Gongdin við FM

Meistarastevnur SSF hava hesi seinastu 10 árini verið fyri munandi broytingum, tá ið tað kemur til serliga dagseting og ískoyti av øðrum stevnum, umframt nú í seinastuni, um KVF vildi senda.

Upprunaliga høvdu vit 3 meistarastevnur í vanliga svimjiárinum, men vóru vit í 2022 uppi at venda á 7 meistarastevnum, harav ein norðurlendsk. Nú eru tað aftur 3: ABMS, FML/JML og FMS/JMS.




'Flaggskipið' var upprunaliga Føroyameistarastevnan (FM), sum í 2016 fekk afturat sær FM á langgeil, og sum síðani varð flutt til at vera í november, enntá við tveimum FM í 2017.

Vegna avmarkingina til bara føroyskar íkarar á FM, royndu vit okkum frá 2019 til 2023 við Atlantic Open, til at royna at fáa eisini útlendingar at kappast í Føroyum.

Masters-stevnan FOMM varð strikað aftaná 2018, tí at trupult var at finna nakran at skipa fyri henni. Og so hava vit gjørt onkrar royndir afturat, t.d. við FM fyri lið í 2022, og ABMS Sprint í 2022 og 2023.

Og so var sjálvsagt korona eisini, ið ávirkaði 2020 og 2021.

Í 2024 tóku vit burtur aftur ABMS-sprint, tí at kalendarin var ríkiliga fullur, umframt at Atlantic Open mátti avlýsast vegna trot á fólk at avgreiða stevnuna.

Nú til í 2025, skipar HS fyri Swim Open Tórshavn, sum eftir ætlan verður ein afturvendandi stevna á altjóða støði, ið vónandi kann lokka útlendingar til eisini.

Luttøkan hevur verið rættiliga stabil, her á Føroyameistarastevnuni á stuttgeil:




Og tað er topp-støðið eisini, um hugt verður at bestu AQUA-stig:




Spurningurin er so sjálvsagt, um 'stabilt' er nóg gott, tá ið endamálið er at mennast.

Kanska nýggju hallirnar fara at hjálpa uppá hetta, í Havn og í Runavík.

# Gongdin við landsliðnum

Tá ið SSF í 2021 skifti til at vilja royna seg við føstum landsliðsvenjara aftur, var tað tí at vit høvdu afturvendandi avbjóðingar við skipanini har allir venjararnir vóru á skift úr feløgunum.

Støðugu útskiftingarnar viðførdu í heilum til miskiljingar í sambandi við landsliðsferð, og var tað hartil trupult at fáa í lag annað landsliðsvirksemi, so sum serliga landsliðslegur.

Hartil høvdu úrslitini í eina tíð verið einki at reypa av, tá ið man hugsar um hvussu væl úttiknu svimjararnir svumu á landsliðsferð, í mun til støði teirra annars.

Starvsnevndin samtykti tá at vilja seta ein landsliðsvenjara, og at spyrja Kristian Martin Joensen, vegna tann profil sum hann hevur millum føroysk boð uppá ein slíkan venjara.

Vit sóu beinanvegin ein bata, men hava tað tó so verið afturvendandi avbjóðingar, sum viðførdu at vit í leypi av 2023 fingu hug at royna okkum við einum landsliðstoymi, heldur enn éinum venjara.

Og nú gekk væl frægari, um hugt verður at hvussu nógvir svimjarar seta bestu tíð á landsliðsferð, umframt at hvussu vit kláraðu okkum serliga á Oyggjaleikum og NM/NJM 2023.

Myndin her vísir hvussu nógvir svimjarar sum hava betrað seg á landsliðsferð, umframt hvussu nógv av øllum úrslitunum tilsamans vóru betri á landsliðsferð, síðani 2018:




Nú til í 2025, royna vit okkum sum kunnugt við nýggjari skipan, har ein landsliðssamskipari samskipar landsliðsvirksemið, m.a. við innstilling av venjarum og leiðarum til starvsnevnd SSF.

# Annað virksemi 2024-2025

## Umboðan á fundum í Føroyum og uttanlanda

SSF luttekur so vítt gjørligt altíð á teimum pallum, har vit væntast at luttaka, so sum hjá ÍSF, í norðurlendska svimjisambandinum NSF, í norðurlendska lívbjargingarbólkinum NLSG, í evropeiska svimjisambandinum EA, í altjóða svimjisambandinum World Aquatics (AQUA), umframt nú eisini í evropeiska lívbjargingarsambandinum ILSE og altjóða lívbjargingarsambandinum ILS.

Í tíðarskeiðnum síðani seinasta aðalfund, vóru tiltøkini í øllum førum hesi:

- 19. apríl 2024: IIGA-vitjan ('site visit') í Havn
- 24. - 25. apríl 2024: Ítróttastjórafundur í Oslo
- 4. mai 2024: ÍSF-aðalfundur í Tórshavn
- 21. mai 2024: ÍSF-fundur um Oyggjaleikir 2027
- 18. juni 2024: ÍSF-eykaaðalfundur í Tórshavn
- 28. august 2024: ÍSF-kunningarfundur um Holdsport
- 29. august 2024: NSF-forfólkafundur á netinum
- 10. september 2024: ÍSF-kunningarfundur um Anti Doping
- 16. september 2024: ÍSF-kunningarfundur um nýggja Úrval
- 24. - 25. september 2024: NLSG-ársfundur í Stockholm
- 27. - 28. september 2024: DEI-ráðstevna og EA-aðalfundur í Belfast
- 28. september 2024: NSF-ársfundur í Belfast
- 30. september 2024: AQUA-eykaaðalfundur á netinum
- 2. oktober 2024: ÍSF-hoyringsfundur um síðuna: Tryggur ítróttur
- 26. - 28. oktober 2024: ÍSF-tiltak um sjálvboðin
- 28. oktober 2024: Langhylurin í Havn tikin í nýtslu
- 19. november 2024: Heystumboðsting ÍSF
- 30. november 2024: NSF-forfólkafundur á netinum
- 10. desember 2024: AQUA European Session í Budapest
- 6. januar 2025: NSF-forfólkafundur á netinum
- 8. - 9. januar 2025: NSF-aðalskrivarafundur í CPH
- 15. januar 2025: ÍSF-fundur um Oyggjaleikir 2027
- 10. mars 2025: NSF-fundur um parasvimjing

# Onnur SSF-tiltøk

SSF roynir eftir førimuni at skipa fyri stimbrandi tiltøkum í Føroyum og fyri føroyingar, afturat sjálvum svimjistevnunum, til at betra um samstarv og førleikar hjá okkum innan svimjingini, og til at vaksa um áhugan fyri svimjing sum heild.

Í tíðarskeiðnum síðani seinasta aðalfund, vóru tiltøkini í øllum førum:

- 25. mai 2024: Landsliðslega í Vági
- 14. september 2024: Forfólkafundur í Tórshavn
- 18. - 20. oktober 2024: Nordic Learn to Swim Conference í Tórshavn
- 1. - 2. november 2024: Talentlandsliðslega í Klaksvík
- 23. november 2024: Landsliðslega í Havn
- 25. januar 2025: Forfólkafundur í Tórshavn
- 8. februar 2025: Kalendarafundur í Tórshavn
- 15. mars 2024: Landsliðslega - avlýst

Serliga var Nordic Learn to Swim Conference ein stór avbjóðing, nú vit skuldu fáa í gongd aftur táttin við norðurlendskum svimjifrálæruráðstevnum, aftaná ein steðg vegna korona síðani 2019. Ráðstevnan eydnaðist sum so væl, men kundi undirtøkan væl hava verið betri.

# Stutt um okkara limaskapir

## ÍSF

ÍSF skipar tvær ferðir um árið fyri umboðstingum, har forfólk í sersambondunum møtast til at viðgera ymisk viðurskifti, ímillum árligu aðalfundir. Hetta seinasta árið hevur viðgerðin verið serliga um endurskoðan av strategi ÍSF, um endurskoðan av Úrval, um Oyggjarleikir 2027, um nýggju limaskipanina, um átakið Tryggur Ítróttur, og um nýggjar puljur.

## NSF

Hetta seinasta árið hevur verið rættiliga friðarligt í norðurlendska svimjisambandinum, líka undantikið at vit í felag hava talað at avgerðini hjá World Aquatics at bjóða Russlandi við aftur til sínar stevnur, umframt at mannagongdini hjá World Aquatics í hesum sambandi. Huglagið og samstarvið er gott í NSF, við góðum og konstruktivum fundum.

## LEN/European Aquatics

Undirritaða SSF-forfólk er síðani februar 2022 bureaulimur í LEN/European Aquatics, við ábyrgd fyri serliga miðlan og svimjiførleika. Hetta eru spennandi uppgávur, har vit millum annað hava umskipað miðladeildina og skift út heimasíðu, og ísv svimjiførleika hava tilevnað ein evropeiskan standard fyri vatntryggleika og svimjiførleika, sum nú verður rullaður út í Evropa.

Afturmeldingarnar hava verið góðar, til okkum sum nú vara av evropeiska svimjisambandinum, og vórðu vit tí eisini einmælt afturvald á val-aðalfundinum í januar 2024, tá ið felagsskapurin hartil skifti navn frá LEN til European Aquatics. Undirritaði heldur áfram við somu ábyrgdarøkjum, umframt nú eisini at byggja upp ein dátudepil til evropeiska svimjing.

## World Aquatics

Viðvíkjandi altjóða svimjisambandinum World Aquatics, er støðan eitt sindur aftur og fram, at tey uppá ta einu síðuna hava góðar stuðulsskipanir, bæði fíggjarliga og til at fáa ráðgeving og hjálp, men á hina taka heldur einaráðandi avgerðir sum opinbart serliga vit norðurlond eru ónøgd við. Bæði um avgerðina at lova Russlandi uppí aftur, men eisini ísv útskifting av norðurlendska umboðnum.

Vit norðurlond royna at tað vit kunnu, at vísa á hvussu vit halda at serliga mannagongdin átti at verið, men fáa svar sum mestsum siga, at her hava tey tikið sína avgerð. Tað virkar í so knorklutt, serliga tá ið sami felagsskapur er raskur at flyta okkum fram á veg, viðvíkjandi ‘good governance’.

### ILS/ILSE/NLSG

Viðvíkjandi altjóða svimjisambandinum, so hoyra vit ikki so nógv, út yvir at vit í 2024 fingu svar uppá leysan fyrispurning um møguliga umsókn um fullan limaskap, at tað ikki ber til vegna ásetingar í lóg ILS. Hinvegin hevur norðurlendski bólkurin NLSG verið virkin aftur, møguliga vegna val í ILS/ILSE, við netfundi í februar 2024 og fysiskum fundi í Stockholm í september 2024.

Evnini hjá NLSG eru serliga vitanardeiling um druknihagtøl og bestu mátar at umganga slíkar, umframt óbeinleiðis at styrkja um okkara felagsskap. So-ella-so verður roynt at fáa eina mynd av 'best practice' sambært NLSG, sum kann styrkja okkum í samskifti við aðrar áhugabólkar.

## Onnur tiltøk

### Úrval

Úrval játtaði til 2023 oyramerktan stuðul til Vár E. Eidesgaard (2001), Elisabeth Erlendsdóttir (2005), og til '15 tey næstbestu'. Til 2024 játtaði Úrval aftur til tær báðar og '15 tey næstbestu', umframt tá eisini til Isak Brisenfeldt (2006) og Líggjas Joensen (2008).

Á aðalfundi ÍSF í 2024 varð samtykt at skifta til eina nýggja úrvalsskipan, iðikki er líka vælegnað til okkum, og sum vit tí atkvøddu ímóti. Nýggja skipanin kravdi úrvals- og landsliðsætlan, har vit m.a. skiftu til at leggja meira í liðsvimjing, tí at einstaklingaavrik ikki longur hava eins stórt virði.

### AQUASP

SSF hevur síðani 2018 fingið fíggjarligan stuðul frá altjóða svimjisambandinum World Aquatics, til menning av okkum ítróttarliga. Fyrstu árini royndu vit at byggja upp eina testprotokoll, áðrenn vit frá umleið 2021 skiftu til heldur at søkja um stuðul til tryggari verkætlanir, so sum útreiðslur til stevnuskipanir, og luttøka á Bergen Swim Festival og Danish Open

Til í 2023 kravdi World Aquatics nú afturat, at vit millum annað skulu brúka pengar uppá 'good governance', umframt til virksemi sum var beinleiðis til gagns fyri íðkararnar.

Til í 2024 søktu vit um stuðul til hesi tiltøk, og fingu játtan frá World Aquatics:

1) Fyrsta føroyska íðkaraforum, sum innleiðing til gallaveitsluna 2024
2) Luttøka á Danish Open 2024
3) Hald (forrit) ísv stevnuforrit okkara (Tempus, WinGrodan, SwimRankings, SITB)

Stuðulin frá AQUA var USD 25.000 í 2024, har hann til 2023 var USD 30.000. Orsøkin til minkingina, var at vit í 2024 fingu USD 5000 í bonus fyri at røkka hægri stig í teirra árligu 'good governance' kanning. Til í 2025 fingu vit so aftur flutt okkum upp á USD 30.000, til 19 av 20 møguligum stigum.

## AQUA Mentorship verkætlan

Aqua Mentorship verkætlanin er sum so liðug, men eru avleiðingar m.a. at forfólk SSF hevur luttikið sum mentor á fundi fyri onnur lond, og at vit eiga at endurnýggjast okkara strategi. Strategiin frá 2022 er útgingin, men hava vit so í staðin lagt okkum hjá ÍSF, sum eisini stendur til at endurnýggjast.

## World Drowning Prevention Day

Altjóða lívbjargingarsambandið ILS heitir regluliga á okkum limalond, at seta sjóneykuna á World Drowning Prevention Day, sum ST í 2021 samtykti at skula vera árliga hin 25. juli. Í 2022 gjørdu vit nógv burturúr, men er tíðspunktið óheppið fyri okkum, vegna uttanlanda stevnur og Ólavsøku.

## Útbúgving

Viðvíkjandi útbúgving, so hevur ein afturvendandi trupulleiki tíverri verið, at vit ábyrgdarar gjarna vilja hava skeið á skrá, fyri so at síggja lítla undirtøku til sjálvi skeiðini. Hetta var t.d. beinleiðis avbjóðing til at World Aquatics ikki lutaði okkum skeið í 2023 og 2024, vegna avlýst skeið í 2021 og 2022

Eitt væleydnað dómaraskeið var í mars 2022 og eitt líka væleydnað lívbjargingardómaraskeið í september 2022. Rakul í Lágabø tók yvirdómaraútbúgving á sumri í 2023, og Nordic L2C Conference var væl eitt slag av útbúgving eisini; men annars hava tað bara verið smærri tiltøk fyri ávís feløg.

Tað er tó eingin ivi um at skeið eiga at vera, serliga nú Oyggjaleikir verða í Føroyum í 2027. Og vit hava góðar møguleikar til at fáa bílig skeið, serliga frá okkara vinum í Dansk Svømmeunion.

## Tøkni

SSF mennir regluliga um sínar tøkniligu skipanir, til at lætta um hjá okkum í felagsskapinum, væl vitandi at tað serliga er arbeiðskraftin, sum er fløskuhálsur. T.d. er stevnuskipanin [Tempus] nú álitið, sum vit fingu í 2021, og verður limaskipanin Holdsport vónandi ein líka stór succés, sum ÍSF í 2024 fekk í lag og fíggjar. Í 2024 var talan mest um viðlíkahald, men er ætlanin til 2025 m.a. at styrkja um stroymingarloysnina, m.a. við einum ískoyti sum eisini kann brúkast fyri seg til smærri tiltøk.

## Antidoping

Føroysk svimjing tekur sjálvsagt fult undir við miðvísa arbeiðinum hjá ÍSF saman við Antidoping Danmark og øðrum at basa møguligari doping í ítrótti. Tí hava vit eisini eftir áheitan frá ÍSF lagt hendan boðskap út á heimasíðu okkara, við leinki til viðkomandi myndugleikar.

## GDPR

Í 2021 kom nýggja løgtingslógin um vernd av persónupplýsingum í gildi, vit ítróttarsambond og -feløg eisini mugu fyrihalda okkum til. Virksemið hjá okkum er her serliga, at vera ansin og royna at minka um viðgerð av persónsdáta, umframt at goyma sovorðið forsvarliga.

## Breidd

SSF hevði á pappírinum einki beinleiðis breiddartiltak í 2024, útyvir at norðurlendska svimjifrálæruráðstevnan sjálvsagt er ætlað til at menna tey sum taka ímóti nýggjum svimjarum. Hinvegin tykiskt stórur vøkstur at vera í luttøkuni á barnastevnum runt landið.

## Svimjiførleiki

Her var nevnda norðurlendska svimjifrálæruráðstevna okkara størsta átak í 2024, tíverri uttan væntaðu luttøku frá øðrum enn okkum og okkara feløgum, men tó sera góð sambært eftirmetingum frá luttakarunum. Til nú í 2025, tosa vit við European Aquatics um møguliga svimjiskúlaskipan.

## Svimjihallir

Í heysti í 2024 hendi tað endiliga , at nýggja svimjihøllin í Havn lat upp. Tað var eitt stórsligið tiltak, og prógvaði høllin seg longu á FM á stuttgeil í november, har heilt nógv met vórðu sett.

Nú í summar letur so svimjihøllin í Runavík upp, har høvuðshylurin er 25m langur og 20m breiður, so at kappast kann á 8 geilum. Áhugavert at síggja hvussu tað økið mennist, nú tey hava sina egnu høll.

## Skrivstova hjá ÍSF

Sum avleiðing av byrjanini uppá langhylin í Havn, var ÍSF-húsið tikið niður á heysti í 2020, ið so aftur viðførdi, at SSF vegna goymslutørv flutti til góðar umstøður hjá Runavíkar kommunu í  Saltangará. Har eru vit enn, um enn vit so smátt eru byrjað at flyta okkum til Havnar aftur, eisini tí at bygningurin í Saltangará er settur til sølu. Aðalskrivarin hevur pláss í Havn, og er nakað av goymsluni nú eisini har.

## Safeguarding

Vegna nýggj krøv um serliga barnaváttanir, og krøv og ynski til yvirhøvur at betra um trygd og trivnað, so royna vit alsamt at betra um hesi viðurskifti. Allir venjarar og leiðarar hava nú barnaváttan, sum luttaka á landsliðsferðum, óansæð aldur á teimum á ferð; og vit royna sum heild at styrkja um tær avtalur vit hava við hesi sum taka ábyrgd vegna SSF á uppgávum okkara.

Eitt átroðkandi ísv 'good governance' meting okkara hjá World Aquatics, umframt sjálvsagt yvirhøvur, er at fáa eina fráboðanarskipan í lag, so at fólk kunnu fráboða um eitthvørt óheppið. Samskifti er við serliga World Aquatics og ÍSF, og sær tað tíbetur út til at ÍSF hevur ella fær eina skipan í lag, við átakinum Tryggur Ítróttur.

## 'Good governance'

Afturat nevndu átøk til at betra um okkara fyrisiting, er gott samskifti við serliga ÍSF og World og European Aquatics, um hvar vit eiga at liggja ísv hetta 'good governance'. Øll ynskja sjálvsagt hægst møguliga støði, men má tað avvigast í mun til avmarkaðu arbeiðsorku okkara, serliga tá ið tað kemur til møgulig nýggj átøk. Vit royna sjálvsagt at gera tað sum vit gera so rætt sum gjørligt, og víðka so í stigum, til dømis við vónandi fráboðanarskipan og gjøgnumskygnisátaki nú í 2025, og við undirskriving av ynsktu inklusións-deklaratión hjá European Aquatics nú aftaná hendan fundin.

## Stuðlar

Høvuðsstuðul hjá Svimjisambandi Føroya er Atlantic Airways, sum hevur verið hollur stuðul í nú mong ár. Hartil hava vit haft trúgvar stuðlar serliga í sambandi við okkara meistarastevnur, umframt at hava fingið góðan stuðul frá teimum kommunum og felagsskapum, sum vit hoyra til, frá Løgtinginum og Veddingini umvegis ÍSF, frá Úrvali og frá teimum stuðulsskipanum sum finnast serliga umvegis ÍSF.

Hinvegin hevur ein stórur smeitur verið, at Kringvarp Føroya hevur valt FM í svimjing frá í sínum raðfestingum, sum so aftur hevur kostað okkum nógv í lýsingarinntøkum. Hetta er raðfesting sum vit ætla okkum at spyrja inn til, so skjótt sum nýggjur kringvarpsstjóri er settur.

# Niðurløga

Hetta var so mítt ellinta ár sum forfólk SSF, ella 10½ um vit taka við, at vit í 2018 fluttu aðalfundin frá at vera um heystið, til í staðin at vera aftur um várið í 2019.

Eg plagi at siga við fólk, at hóast her hava verið sera nógvar góðar løtur, so sita tær ringu eftirhondini eisini í rygginum, sum vilja verða um tú ert uppi í onkrum í nóg langa tíð.

Vit eru í eini broytingartíð, har felagsskapir endurskoða sítt virksemi, við revidering av reglugerðum og mannagongdum, ofta við krøvum sum krevja meira og meira umsiting.

'Gott governance' er á veg fram, tíbetur, sum bøtur uppá mangt sum eg minnist sum løgið við at koma uppí ein felagsskap sum SSF. Til dømis, at man skuldi finna seg í skolur og útspilling.

Hinvegin er tað tíverri enn afturvendandi, at uppgávur koma við ov stuttari freist, eisini frá hægri myndugleikum. Og at svar ikki koma uppá fyrispurningar, óansæð rykkjarar.

Vit gera tað vit megna, eisini um freistin er stutt, og tíbetur sær tað út til at føroysk svimjing styrkist, bæði ítróttarliga og rundan um sjálvan hylin.

Oyggjaleikir í 2027 verða í Føroyum, sum er stórt og spennandi, men eisini stór avbjóðing fyri okkum ítróttir. Vit sjálvbodnu kunnu vænta okkum, at skula spíla okkum út, uttan serliga sømdir afturfyri.

Sjálvur eru mínar vónir serliga til sera jaligu tónarnar í World og European Aquatics, um útbúgving, sertifisering og útbúgving av dómarum og venjarum, til at tryggja støðuga góðsku og menning.

Og hvør veit? Kanska eru vit so líðandi klár at hyggja at hinum vatnítróttunum eisini, so sum at nú í mai luttaka á EM í Open Water; og við nýggjum hallum kanska hyggja at øðrum ítróttum eisini.

Eina hjartans tøkk til tykkum mongu sum hjálpa til við øllum hesum ymiska, sum vit fáast við í føroysku svimjingini. Tit vita hvørji tit eru, og at tað sum tit gera, ger mun.

Bestu eydnu í komandi ári.

við svimjikvøðu,

Saltangará 19. mars 2025
Rókur í Jákupsstovu